# Týr á heimsins størsta tungmálms festivali

**Tá Wacken Open Air fer av bakkastokki í august komandi ár, verður tað m.a. við tónunum av Orminum Langa, festivalurin kunnger á heimasíðu síni, at Týr er á skránni fyri komandi ár.**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Týr gerst í hesum døgum eitt alt størri navn millum týskar málmsfjeppar*
*mynd: Bárður Eklund*

Týr spældu í gjárkvøldið síðstu konsertina á fyrru konsertferð síni í heyst, fyri einum fullsettum rokkklubba í Keypmannahavn. Konsert ferðin hevur m.a fevnt um 18 konsertir í Týsklandi, ið má metast sum størsti marknaðurin fyri tungmálm. At bólkurin byrjar at fóta sær á hesum sera stóra marknaði er júst vorðið enn greiðari, tí heimsins størsti tungmálms festivalur Wacken Open Air hevur boðað frá, at Týr verða á skránni hjá Festivalinum komandi ár.

Wacken Open Air hevur verið hildin fyrst í august seinastu 15 árini og festivalurin er støðugt vaksin, soleiðis at í ár spældu 57 tungmálmsbólkar fyri teimum 60.000 gestunum. Wacken Open Air kann sostatt kalla seg heimsins størsta tungmálmsfestival.

Tá fólk tóku stig til fyrsta Wacken Open Air í lítlu bygdini Wacken í Slesvíg-Holstein í 1990, var tað eingin sum hevði roknað við, at hetta skuldi gerast ein risa festivalur. Fyrsta árið var talan um seks rættiliga ókendar týskar tungmálmsbólkar, men longu í 1993 vóru størri nøvn á skránni. Í 1998 var festivalurin vaksin til tann størsta av sínum slag, og síðan hevur vøksturin verið støðugur.

- Í Wacken búgva beint undir 2000 fólk, so tá festivalurin er, verður fólkatalið 30 faldað í nakrar dagar. Men festivalurin er tiltikin friðarligur, eitt slag av symbiosu millum harðar tónar og friðarligan atburð, greiðir týski Føroyavinurin og tónleikafjepparin Arne List frá.

Higartil eru hesi nøvn almannakunngjørd á Wacke Open Air 2007: Blind Guardian, Grave Digger, Haggard, Immortal, In Flames, Kampfar, Moonspell, Rage, Samael, Saxon, Schandmaul, Stratovarius, Therion og Týr.

Á seinnu konsertferð síni, ið verður í november spælir Týr 11 konsertir í Týsklandi, og her verður ríkur møguleiki at vinna enn fleiri týskar tungmálmsfjepparar.

*kelda: Wikipedia.org*



*Wacken Open Air savnaði í fjør 60.000 málmsfjepparar*

# Høgni Lisberg fingið útbreiðslusáttmála við danskt útgávufelag

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Ársins føroyska fløga 2005 Morning Dew hjá Høgna Lisberg verður nú givin út í Danmark, á plátufelagnum Sonet Records, ið nýtir útbreiðslunetið hjá Universal Records og allar møguleikarnar fyri alnetsølu, ið Universal hevur ment.

Høgni Lisberg skrivaði ígjárkvøldið undir sáttmála um útbreiðslu í Danmark av, fløguni ið vann planetina fyri bestu útgávu á Planet Awards í ár, við plátufelagið Sonet Records, ið er ein partur av Universal Denmark.

Hetta merkir, at fløgan Morning Dew verður send út á danska marknaðin, við hesum plátufelagnum í rygginum. Hetta letur sjálvandi nógvar dyr upp. Tí hóast Sonet Records ikki varð endurstovnað fyrr enn í juni í ár, so hevur felagið pondus.

Í 60'unum og 70'unum var Sonet Records eitt tað mest týdningarmikla plátufelagið á danska marknaðinum, men síðan datt felagið niðurfyri. Tað var ikki fyrr enn í ár, at Universal tók stig til at endurstovna søguliga felagið. Nýggja Sonet Records er ætla at vera eitt alternativ til Universal, eitt slag av indiefelagi, ið arbeiðir óheft av móðurfelagnum. Men sum samstundis nýtir útbreiðslunetið hjá Universal og allar møguleikarnar fyri alnetsølu, ið Universal hevur ment.

Grundhugsjónin er at bjóða tónleikarunum nógv meira skapandi frælsi enn vanligt er í plátufeløgum. Tónleikarar og plátufelag skulu kunna hyggja hvør annan í eyguni, og tónleikurin skal vera í miðdeplinum. Hjá Sonet Records fáa tónleikarar møguleika at velja millum nógvar ymiskar tænastur frá Sonet Records, eitt nú sum Høgni nú hevur fingið, útbreiðslusáttmála, ella útgávusáttmála, umboðan, miðlavenjing, hjálp við at gera sjónbandaløg og mangt annað.

Frammanundan hevur Høgni Lisberg sáttmála við TUTL, ið er galdandi fyri Føroyar og við Rough Trade, ið er eitt stórt útgávufelag sum virkar í øllum Europa. Avtalan hjá Høgna er tó einans galdandi í Hollandi, Belgia og Luksemborg.

Høgni hevur júst gjørt sáttmála við nýggjan umboðsmann. Talan er um danan Jesper Kemp, ið m.a. hevði rættiliga nógv at gera við gamla bólkin hjá Høgna, Clickhaze.

Í næstum skal Høgni luttaka á víðagitna Airwaves festivalinum í Reykjavík.



*Høgni Lisberg býr í Danmark, og hevur spælt nokkso fitt har, nú verður nýggjasta fløgan hjá Høgna send út á danska marknaðin*

# AME – Føroyar verður í apríl

**Á tíðindafundið í morgin árini fer Norðurlandahúsið og samstarvsfelagar tess at kunna um Atlantic Music Event – Føroyar, tiltakið, ið kemur ístaðin fyri Prix Føroyar og sum m.a. lutar eina fløguupptøku til besta bólkin.**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá fyriskipararnir av avgjørdu at sleppa Prix Føroyum, varð sagt, at Norðurlandahúsið arbeiddi við aðrari ætlan í staðin fyri Prix Føroyar finaluna. Á tíðindafundi í morgin verður tiltakið lagt fram.

Tað skilst, at Norðurlandahúsið, saman við tónleikafeløgum, føroyskum festivalum, útgevarum o.ø. hevur tikið stig gera eitt nýtt tónleikatiltak Atlantic Music Event – Føroyar.

Feløgini sum standa aftan fyri tiltakið eru m.a. TUTL, 3-arin, Grót, FUT og fleiri onnur. Norðurlandahúsið sigur, at flestu av føroysku tónleikafestivalunum longu hava boðað frá, at teir stuðla tiltakinum, ið verður eitt slag av avloysara fyri Prix Føroyar finaluna, ið plagdi at verða í Norðurlandahúsinum í apríl mánað.

Fyrireikarnir fara eins og til Prix Føroyar finaluna at royna at fáa útlendskar gestir til Føroyar hetta vikuskiftið, m.a. festivalar, útgevarar og onnur. Ætlanin er at hava konsertir, fyrilestrar og annað vikuskiftið 13. og 14 apríl 2007 í Norðurlandahúsinum. Millum onnur fer føroyski vinnarin av Global Battle Of The Bands 2006. Eisini verður bólkurin, ið hevur er valdur at hava útgivið bestu fløgu bjóðaður luttøku.

Tilsamans er ætlanin, at 12 bólkar framføra í Norðurlandahúsinum hetta vikuskiftið. Millum hesar verða eisini nýggir spennandi norðurlendskir bólkar.

Sum nakað nýtt fáa allir føroyskir bólkar møguleika at senda inn eina demoupptøku. Virðisløn verður so latin til besta bólkin, hendan er ein fløguupptøku.

# G! Music fegnast um hamskifta AME tiltakið

**Nýggja og hamskifta AME tiltakið, sum norðurlandahúsið skipar fyri í næsta ár, í samstarvi við umboð fyri tónleikalívið í Føroyum, er sambært Jón Tyril eitt framstig**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

AME Føroyar hevur longu nú bjóðað komandi vinnaranum av føroysku GBOB kappingini, at spæla tá ið tiltakið fer av bakkastokki í apríl næsta ár, og hetta fegnast Jón Tyril stjóri í G! Music, sum m.a. skipar fyri GBOB kappingni og G! Festivalinum.

- At Norðurlandahúsið stuðlar GBOB kappingini fíggjarliga og hevur valt at bjóða føroyska vinnaranum við til stóra sýnisgluggatiltakið í apríl mánaða er at gleðast um. Vit hava skotið upp, at Norðurlandahúsið savnar allar kreftir til eitt nýtt og endurnýggjað sýnisgluggatilak og fær flest møguligar partar við í eitt samstarv um tiltakið, greiðir Jón Tyril frá.

- Avgerðin at umskipa AME og taka umboð fyri størsta partin av føroyskum tónleikalívi við í planleggingina er sera skilagóð. At NLH eisini velur at arbeiða saman við GBOB og stuðla tí eru týðilig tekin um góða samstarvsviljan og dirvið til at hugsa nýtt og at laga seg til broyttar umstøður hjá Norðurlandahúsinum, heldur Jón Tyril.

- Eg haldi vit fáa bæði eina betri kapping OG eitt betri sýnisgluggatiltak í Norðurlandahúsinum við at allir partar arbeiða saman, stutt sagt fáa vit bæði posa og sekk til føroyskt tónleikalív, og tað er fremsta málið við tiltøkum av hesum slag, sigur Jón Tyril.